# Miðlafólk mótmæla álopum á fakið



*Anna V. Ellingsgaard er forkvinna í fakfelagnum, Føroysk Fjølmiðlafólk*

*Savnsmynd*

**Fakfelagið hjá føroyskum blað- og fjølmiðlafólkum, Føroysk Miðlafólk, mótmælir harðliga álopinum á journalistiska fakið, sum felagið metir uppsagnirnar á Dimmu og Kringvarpinum at vera**

UPPSAGNIR

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tað var ikki besta jólagávan, sum fleiri starvsfólk í Dimmu-samtakinum og í Krinvarpi Føroya fingu frá sínum arbeiðsgevara. Í skrivi til fjølmiðlarnar átalar fakfelagið hjá fjølmiðlafólkum, Føroysk Miðlafólk, uppsagnirnar í teimum báðum fjølmiðlahúsunum.

- Føroysk Miðlafólk eru væl vitandi um, at tað fíggjarliga sansar at bæði á privatum og almennum arbeiðsplássum. Kortini undra vit okkum almikið yvir uppsagnir av starvsfólki við journalistfakligum førleika og aðrar uppsagnir, ið beinleiðis skerja journalistisku framleiðsluna bæði í dygd og vavi, skrivar felagið.

Víðari verður sagt, at viðvíkjandi Dimmalætting-samtakinum kunnu vit staðfesta, at fólk við journalistiskari útbúgving eru uppsøgd og somuleiðis fólk, ið hava so drúgvar journalistiskar royndir, at tey hava ognað sær journalistiskar førleikar, ið viga upp ímóti útbúgving á økinum.

Føroysk Miðlafólk er farið inn í uppsagnarmálini hjá teimum starvsfólkunum á Dimmalætting, ið eru sett eftir sáttmálanum millum felagið og Føroya Blaðútgevarafelag.

Felagið skrivar, at tað er farið inn í tey málini, tí uppsagnirnar ikki eru framdar í fullum samsvari við sáttmálan, eins og nógvir ivaspurningar eru.

- Hesum mótmæla vit sjálvsagt, men tann ítøkiliga viðgerðin av hesum fakliga stríðsmáli skal ikki gruggast her. Føroysk Miðlafólk hevur tó ein grundleggjandi áhuga í at verja um journalistiska fakið. Tí harmast vit eisini stórliga nógvu uppsagnirnar av journalistum í Dimmalætting-samtakinum, sum ikki eru sáttmálasettir.

Eisini í Kringvarpi Føroya eru uppsagnirnar ein sera dyggur smeitur fyri journalistiska fakið, skrivar Føroysk Miðlafólk.

- Sjey av teimum átta uppsøgdu eru beinleiðis partur av dagligu framleiðsluni. Tað sum ger ilt verri, og sum er púra óskiljandi fyri Føroysk Miðlafólk, er, at kringvarpsleiðslan konsekvent hevur avgjørt at siga fólki við drúgvum royndum, og sum røkja kjarnuuppgávur í journalistfakligu framleiðsluni, úr starvi, skrivar felagið.

Nevndin í felagnum vísir tó á, at Føroysk Miðlafólk ikki hevur sáttmála við Kringvarp Føroya.

- Vit vit vilja við hesum harðliga mótmæla álopinum á journalistfakið og tilhoyrandi framleiðslufakið, sum er framt á Dimmalætting-samtakinum og í okkara einasta almenna miðlahúsi – almenna Kringvarp Føroya, ið eigur at vera fremsti garantur fyri fjølbroyttum og óheftum journalistikki, skrivar Føroysk Miðlafólk í skrivinum, sum forkvinnan í felagnum, Anna V. Ellingsgaard, hevur sent fjølmiðlunum.


Sosialurin
Sosialurin
i






Vaktleiðari til Kommunalu Brennistøðina

Sóknast verður eftir vaktleiðara til Kommunalu Brennistøðina á Hjalla. Arbeiðið umfatar rakstur av brenniovni í døgnvaktarskipan umframt umvæling og røkt av útgerð, maskinum o.ø.

Førleikakrøv

Tú hevur útbúgving sum handverkari, helst innan metal ella el-yrkið. Fyrimunur er við viðkomandi royndum. Tú hevur eisini koyrikort og teldukunnleika á brúkarastigi.

Setanarviðurskifti

Starvið er fulltíðarstarv. Starvið verður sett frá 1. februar 2009 ella skjótast til ber. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna.

Meira at vita

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bárð Michelsen, leiðara, tlf. 228918, ella Mikkjal Absalonsen, tekniskan leiðara, tlf. 217582.

Umsóknir

Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu sendast til Tórshavnar kommunu, Postsmogu 32, FO-110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. januar 2009 kl. 12.00. Viðmerkið „Vaktleiðari til Kommunalu Brennistøðina" á umsóknina.

Tórshavnar kommuna



SEV

www.sev.fo

MASKINMEISTARi til Vágsverkið

Eitt starv sum maskinmeistari við elverkini í Suðuroy er leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið umfatar rakstur og hald av elverk-unum í Suðuroy, bæði sum dagarbeiði og vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Elverkini í Suðuroy umfata í løtuni:**
- Elverkið í Vági við trimum dieselmotorum tilsamans 9,7 MW. Hesir motorar eru riknir við tungolju
- Elverkið í Botni, sum er eitt vatnorkuverk við tveimum turbinum upp á tilsamans 3 MW
- Elverkið í Trongisvági, sum ikki koyrir dagliga, men er til at taka, við einum diesel-motori upp á 2 MW.

Vakthavandi maskinmeistari hevur yvirvaking av og lastfordeiling millum Vágsverkið og elverkið í Botni umframt netyvirvaking og koblingsleiðslu fyri elnetið í allari Suðuroynni.

Uppmøtingarstaðið er á Vágsverkinum, har vaktin hevur tilhald. Arbeitt verður á og út frá hesum arbeiðsstaði til hini elverkini eftir tørvi, og fer flutningur vanliga fram við arbeiðsbili hjá SEV.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv, 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv og royndir innan økið.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri framanundan, sum verður roknaður frá prógvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Palla Mortensen, verkmeistara, ella til Anders Nedergaard-Hansen, deildarleiðara fyri framleiðsluna, báðir á tel. 346800.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum verða sendar til:

Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn.

Umsóknir skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi týsdagin 13. januar 2009.

SEV er grundað á eina samhaldsfasta, fólkaræðisliga skipan, har tann vinningur, sum fæst burtur úr elsøluni, verður í høvuðsheitum nýttur til framtíðar útbyggingar av framleiðslueindum og elkervinum. Á tann hátt verður vinningurin øllum Føroya fólki at gagni, og útbyggingar kunnu fara fram, so hvørt samfelagið mennist, og streymtørvurin økist.

SEV hevur eina veitingarskyldu, sum áleggur felagnum at veita øllum borgarum, virkjum, stovnum o.s.fr. støðugan streym alt samdøgrið. SEV hevur sostatt bæði góðsku- og kervisábyrgdina í Føroyum.

Starvsfólk hjá SEV verða útbúgvin og førleikament sambært galdandi reglum á økinum og krøvum, ið SEV setir til trygd og annað. Vitanin verður áhaldandi viðlíkahildin við bæði innanhýsis undirvísing og skeiðum og eftirútbúgvingum annars.

ELFELAGIÐ SEV · POSTSMOGA 319 · 110 TÓRSHAVN · WWW.SEV.FO · SEV@SEV.FO